SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Fysioterapeutar til Klaksvíkar sjúkrahús

Søkt verður eftir fysioterapeutum til Terapideildina á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

*Tvey barnsburðaravloysarastørv á lønarbrøki 1,0  frá 1. februar 2023 til 30. apríl 2024*

Førleikakrøv:

- Umsøkjarin skal hava prógv og góðkenning sum fysioterapeutur
- Góð samstarvsevnir og fleksibilitet
- Evnir at arbeiða sjálvstøðugt, í toymi og skapa sær yvirlit
- Evnir at arbeiða við bólkum.

Setanartreytir:

- Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Fysioterapeutfelag Føroya og Ergoterapeutfelagið.

Um tú ynskir at vita meira um størvini ert tú vælkomin at seta teg í samband við Benadictu Sólheim Ellingsgaard telefon 45 45 45 lokal 4668 ella teldupost benadicta@ks.fo

Umsókn, saman við avriti av prógvi og CV, skal sendast til: umsokn@ks.fo

Umsóknarfreistin er 30. november 2022.

Á heimasíðuni www.ks.fo er meira kunning um Klaksvíkar sjúkrahús.
*Sjúkrahúsverkið fevnir um tey trý sjúkrahúsini Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Okkara uppgáva er at veita øllum dygdargóðar heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.*

*Vit eru trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir felags virðum. Í Sjúkrahúsverkinum vísa vit virðing fyri sjúklingunum, avvarðandi og starvsfólki, og miða altíð eftir at veita rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.*

*Sjúkrahúsverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har virðini stev, áræði og flog, eru okkara kumpass, sum vit brúka í okkara yrki í gerandisdegnum. Í Sjúkrahúsverkinum starvast út við 1.200 starvsfólk innan 30 ymiskar fakbólkar.*

*Á heimasíðu okkara www.ks.fo kanst tú lesa um okkara visjón, missión og strategimál undir leinkjuni ”Sjúkrahúsið”.*